# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Allir svimjararnir betraðu seg

**Føroyska svimjilandsliðið hevur seinastu dagarnar luttikið í stuttbana-EM í Rijeka, Kroatia. Einki heiðursmerki spurdist burturúr, men tó megnaðu allir svimjararnir at betra seg í onkrari grein. Ikki óvæntað gjørdist Pál Joensen stóra hetjan**

SVIMJING
*Pætur Albinus*
*patur@sosilalurin.fo*

Hetta stuttbana-EM varð svomið í 25 metrar longum hyli, og kundi hetta tískil síggjast sum ein fyrimunur hjá føroysku svimjarunum, av tí at teir dagliga svimja í einum slíkum hyli – í Føroyum er nevniliga eingin 50 metrar langur hylur.

### Heimsins skjótasti juniorur

Eingin loyna er í tí, at trífaldi junior-evropameistarin, Pál Joensen, er sterkasta kort í hondini hjá svimjilandsliði okkara. Og tað var eisini honum størstu vónirnar vóru settar, við tað at hann er sera stinnur 400m frí og 1500m frí. Heiðursmerkið var ikki langt úr eygsjón, tá ið Pál hevði svomið seg í finaluna í 1500m frí. Pál var væl yngsti maður í hylinum, og hóast hann hevði 7. bestu tilmeldingartíðina, so eydnaðist tað honum at svimja seg á eitt 5. pláss. Hetta gjørdi hann við svimja tíðina 14:39.99, sum er einki minni enn heimsins besta tíð hjá juniorum á hesum teini.

Danski kappingarneytin, Mads Glæsner, sum er ein stór medaljuvón hjá dønum, gjørdist nummar 4, og var bara 29/100 av einum sekundi frammanfyri Pál, sum harvið bara var sentimetrar frá at gerast nummar 4.

### Øll betraðu seg

Á føroyska landsliðnum var tað bara Pál Joensen, sum var við heilt frammi. Hetta merkti tó ikki, at úrslitini ikki vóru góð hjá hinum føroysku svimjarunum – tey vóru nevniliga so góð, at allir betraðu um sínar tíðir í onkrari grein.

Føroyska Elspa Mørkøre, sum nú svimur fyri danska svimjilandsliðið, var bara eitt hálvt sekund frá at vinna bronsuheiðursmerki, tá ið hon saman við trimum donskum gentum gjørdist nummar 4 í 4x50 meter medley.

Á svimjiportalinum svimjing.com er føroyska svimjilegan væl nøgd við úrslitið.

- Svimjararnir hjá okkum hava nú ikki meira á skránni her í Rijeka, og niðurstøðan er at tað gekk bara avbera væl. Seks nýggj føroysk met, harav Pál setti fimm í trimum kappingum, og Shaila tók sítt frá Elspu. Fýra donsk juniormet til Pál, og eina bestu juniortíð í heiminum nakrantíð. Har vóru nakrir svipsarir, men flott at øll kláraðu at betra seg í onkrum, stendur at lesa á svimjing.com



*Shaila millum Garðarnar setti nýtt føroyskt met á 50 metra frí*

**Føroysku metini:**
**Shaila millum Garðarnar:** 26.49 í 50 frí - føroyskt met
**Pál Joensen:** 51.82 í 100 frí - føroyskt met
**Pál Joensen:** 1:46.61 í 200 frí - føroyskt met og danskt juniormet
**Pál Joensen:** 3:42.57 í 400 frí - føroyskt met og danskt juniormet
**Pál Joensen:** 7:48.56 í 800 frí - føroyskt met og danskt juniormet
**Pál Joensen:** 14:39.99 í 1500 frí - føroyskt met, danskt juniormet, besta juniortíð í heiminum nakrantíð

# Stjørnan til Havnar

**Ein dystur verður í Sunset-kappingini í kvøld, tá Kyndil tekur móti Stjørnuni**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Á pappírinum er talan um avgreiðsluspurning hjá Stjørnuni, sum í kvøld hevur møguleikan at leggja seg fram um VB í oddastríðnum í bestu kvinnudeildini.

Kyndil eigur enn fyrsta stigið í ár til góðar, og tað er lítið sannlíkt, at hetta fer at koma til høldar í kvøld.

Hinvegin hevur júst Kyndil onkra tíð fyrr tikið Stjørnuna á bóli, so gestirnir hava áður fingið lærupeningin um, at tað sjáldan loysir seg at undirmeta mótstøðuna.

Dysturin á Hálsi í kvøld byrjar klokkan 19.30.

# KÍ byggir upp av nýggjum

**Aleksandar Djordjevic, KÍ-venjari, staðfestir, at klaksvíkingar komandi árini fara at dúva upp á egnar leikarar**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Aleksandar Djordjevic hevur, saman við Jákupi Mikkelsen, fingið álagt uppgávuna at vinna KÍ upp aftur á føroyska fótbóltstindin. Sambært Djordjevic, ætla klaksvíkingar at hetta verður gjørdi við egnum fólki. Tað sigur hann við Norðlýsið.

- Vit hava sæð fleiri føroysk fótbóltsfeløg, sum gera sær eitt gott lið við at útvega sær nakrar av teimum bestu leikarunum í landinum. Tað er eingin kunstur at fáa eitt sterkt lið á tann hátt. Avbjóðingin er hinvegin at skapa og byggja upp eitt væl virkandi lið, har leikararnir kenna sínar leiklutir á liðnum, sigur Aleksandar Djordjevic við Norðlýsið og leggur afturat.

- Hetta tekur sjálvandi tíð, men hetta er ómetaliga spennandi, tí vit hava nógvar góðar og spennandi leikarar millum teir ungu, og so hava vit eisini nakrar royndar mans, sum hava ein sera týðandi leiklut á hesum liðnum.



*Nýggi KÍ-venjarin staðfestir, at takið nú er at byggja upp nýtt lið í Klaksvík*